

Viking Energy og restin av flotanum hjá Eidesvik Offshore skulu mannast við færri norðurlendingum.

# Norðurlendingar ov dýrir - missa arbeiðið hjá Eidesvik Offshore

**Jógvan Hugo Gardar**

30.10.2014 - 15:09

Oljan.fo

Norska reiðaríið Eidesvik hevur í dag boða frá at ætlanin er at siga upp millum 60 og 70 av sínum norðurlendsku starvsfólkum. Orsøkin er at tey eru ov dýr fyri fyritøkuna, skrivar fyritøkan +i einum tíðindaskrivi.

Har stendur millum annað: "*Økte kostnader i de senere år og behovet for å sikre selskapet i fremtiden har vært avgjørende for beslutningen om å redusere antall skandinaviske arbeidsplasser. Det er åpenbart at den norske refusjonsordningen har svekket norske sjøfolks konkurranseevne og er en medvirkende årsak til at Eidesvik nå ser seg nødt til å gå til det alvorlige skritt å redusere antall skandinaviske sjøfolk.*"

Harafturat verður víst til støðuna í oljuvinnuni, har virksemið minkar komandi tíðina, og hetta rakar veitingarfeløgini eisini.

Eidesvik hevur framvegis eini 700 norðurlendsk sjófólk í starvi. Í tíðindaskrivinum stendur einki um hvar innsparingin skal gerast.